Carmi Gillon, ísraelskur sendiharri:

# Ìsraelar vilja ala føroyskt

**Ísraelski sendiharrin í Danmark, Carmi Gillon, heldur, at Ísrael og Føroyar hava góðar samstarvsmøguleikar, tí londini bæði eru so lík. Serliga er tað á KT-økinum og innan aling, at Ìsrael kann verða spennandi fyri føroyskar fyritøkur**



*Ísraelski sendiharrin í Carmi Gillon var herfyri á vitjan í Føroyum. Her greiddi hann frá, at ísraelarar eru sera áhugaðir í føroyskari aling.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

VITJAN

*Heri á Rógvi*

Fyri sløkum tveimum vikum síðani var ísraleski sendiharrin í Danmark, Carmi Gillon, á vitjan í Føroyum.

Tað var felagið Vinir Ìsraels, sum tók stig til vitjanina. Ferðast varð kring landið og fundur vórðu hildnir bæði við landsstýrismenn og fyri limir í Vinir Ísraels, har undirtøkan var framúr góð. Vitjað varð millum annað í Klaksvík og á Eiði. Vinir Ìsraels sigur, at vitjanin riggaði stak væl, og nógv fólk vóru á kunnandi fundi við sendiharranum.

Carmi Gillon er annars ikki hvør sum helst. Hann er víðagitin í fleiri londum fyri sítt fyrrverandi starv sum ovasti fyri Shabak, sum er innanlands trygdarløgreglan í Ìsrael. Shabak fæst millum annað við mótnjósning, og Carmi Gillon hevur verið frammi í donskum fjølmiðlunum við ymsum úttalilsum um avhoyringar av fangum.

Tað eru smá tvey ár síðani, at hann tók við sum ísraelskur sendiharri í Danmark. Hann sigur seg fylgja heilt væl við, hvat hendir í Føroyum sum part av hansara arbeiðið. Hetta er kortini hansara vitjan í Føroyum.

– Føroyar og Ísrael eru rættiliga lík á nógvum økjum. Tað burdi ligið væl fyri at stamstarva, sigur Carmi Gillon.

Carmi Gillon ger fegin viðmerkingar til spentu støðuna í Miðeyestri, men tað lata vit fyri tað nógva liggja á hesum sinni.

Hann ræður kortini fólki til at seta seg væl inn í tinginum, áðrenn tey taka eina støðu, tí alt er ikki so einfalt at skilja.

## KT og aling

Ísrael telist millum trý tey fremstu londini í heiminum innan KT. Tað er serligan innan trygd á telduskipanum, at ísraelar hava gjørt seg galdandi seinnu árini. So nógv, at KT er vorðið størsta vinnugreinin í Ìsrael.

Og KT er nakað, føroyingar hava áhuga fyri eisini. Ísraelskar fyritøkur eru áhugaðar í at fáa størri part í evropeiska marknaðinum. Her kann tað hugsast, at samstarvsavtalur kunnu koma í lag við føroyskar fyritøkur.

Ein av fundunum hjá Carmi Gillon í Føroyum var við KT-felagið. Ein av mest spennandi verkætlanum í Føroyum í løtuni er Bitland, ið KT-felagið spælir ein leiklut í.

Ólavur Ellefsen, sum bæði er partur av leiðsluni í Bitland og KT-felagnum, sigur, at fundurin við Garmi Gillon var positivur, hóast ikki so nógv konkret var á skránni.

Vit fóru glaðir av fundinum, og vit arbeiða nú við at fáa eitt samstarv í lag, sigur Òlavur Ellefsen.

Men ísraelar ætla ikki bera at koma hendanvegin við KT. Eisini føroyska alingin hevur vakt áhuga millum ísraelar.

– Tað er týðuligt, at føroyingar eru á einum høgum vitanarstøði innan fyri alivinnuni. Vit fáast eisini við aling í Ísrael. Hóast tað er undir øðrum umstøðum, so kunnu vit læra nógv av føroyingum, sigur Carmi Gillon.

Hugsast kann eisini, at ísraelar eru áhugaðir í at innflyta meira úr Føroyum.

Sum er innflyta vit nógvan laks úr Norra. Eg dugi ikki at síggja, hví vit ikki tað sama kundu innflutt úr Føroyum, sigur Carmi Gillon.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, hevur saman við øðrum verið í Ísrael og kunna seg um teirra virksemið við kunningartøkni.

Carmi Gillon hevur eisini boðið Anfinni Kallsberg, løgmanni, til Ísraels.

## Fríhandil

Carmi Gillon var á fundi við Bjarna Djurholm, Høgna Hoydal og Anfinn Kallsberg.

Herluf Sigvaldsson, deildarstjóri á uttanlands deildini á Løgmansskrivstovuni, sigur, at talan er um at fáa í lag formelt samstarv við Ísrael. Higartil er munnligt avtala gjørd um at arbeiða víðari við samstarvinum landanna millum.

Tað liggur í luftini at gera eina fríhandilsavtalu, sigur Herfluf Sigvaldsson.

Føroyar hevur fríhandilsavtalur við eitt nú ES og Ìsland sum er. Ein tílík avtala merkir vørufrælsi landanna millum, har allar forðingar, t.e. tollur og kvantitativar forðingar, fyri vøruhandli verða tiknar burtur.

Tað er altíð lætt at práta leyst og fast, men Carmi Gillon heldur, at góðir møguleikar eru fyri, at talan kann verða um gott ítøkiligt samstarv.

– Nú skulu vit fylla samstarvið, sigur Carmi Gillon at enda.

# Roynd i enskum máli í Føroyum

**TOEFL-royndir kunnu nú eisini takast í Føroyum. Royndin er neyðug ætlar tú tær undir útbúgving í Onglandi ella USA**

TÍÐINDASKRIV

Nú verður tað gjørligt at taka TOEFL-test í Føroyum. Fyrsta royndin verður 18. oktober og seinasta freist at tekna seg er 29. august, og tað gert tú á www.toefl.org. Kostnaðurin er US$ 130. Tað vera tvær TOEFL-royndir um árið í Føroyum.

At kalla allir útlendingar, sum fara til USA og Stóra Bretland ella onnur ensktmælt lond, skulu standa onkra málroynd fyri fólk, sum ikki hava enskt sum móðurmál. Fólk, sum arbeiða ella skulu arbeiða í ensktmæltum londum, kunnu eisini hava gleði av slíkari roynd, sum eitt prógv um enskt kunnleika teirra.

Fyrr vóru føroyingar noyddir at fara av landinum at taka TOEFL royndina (Test of English as a Foreign Language), men frá í heyst fer at bera til at taka royndina í Føroyum. Royndin verður tvær ferðir um árið - um heystið og um várið. Royndin verður á Fróðskaparsetrinum. Tað er Altjóða Skrivstovan, sum hevur skipað soleiðis fyri, at tað nú verður bæði bíligari og nógv lættari at sleppa til TOEFL-roynd.

Fyrstu ferð verður leygardagin 18. oktober 2003. Tekningarfreistin er 29. august 2003.

Næstu ferð verður 12. mars 2004. Tekningarfreistin er 26. januar 2004.

Úrslitini eru greið okkurt um ein mánaða eftir royndina.

Royndin sum kann takast í Føroyum er ein sonevnd pappírsroynd. Hon er í fýra pørtum:

Lurta. Her skal nemingurin vísa hvussu væl hann/hon skilir enskt, sum tað verður tosað í Norðuramerika.

Bygnaður. Her skal studenturin vísa, hvussu væl hann/hon dugir at finna orð og setningar, sum teir eiga at vera á 'standard' enskum.

Lesing. Her skal studenturin vísa hvussu væl hann/hon dugir at skilja vanligar akademiskar tekstir, sum verða brúktir í Norðuramerika.

Skriving. Her skal studenturin skriva um ávíst evni í 30 minuttir

Í teimum trimum fyrstu pørtunum er royndin sonevnd 'multiple-choice'. Øll royndin tekur uml 3,5 tímar. Serlig svarhefti verða brúkt til royndina.

Tilber at fáa ókeypis fyrireikingartilfar, áðrenn tú fert til royndina.

Hetta er góð hjálp, tí so veit tú, hvussu royndin er fyriskipað, hvussu spurningarnir vanliga eru og tílíkt, áðrenn tú fert upp til royndina.

Meiri fæst at vita á Altjóða Skrivstovuni, - ask@ask.fo; Tlf. 322065; www.ask.fo - sum hevur kunningartilfar og umsóknarblað, MEN tekningin er beinleiðis til:

TOEFL Registration Office, PO Box 6152, Princeton NJ 08541-6152, United States of America, www.toefl.org



# Óður maður leyp á politistøðina



*Ein óður maður kláraði at bróta seks rútar á politistøðini í Havn, áðrenn hann var steðgaður og koyrdur í brummuna. Løgreglan var upptikin aðrastaðni í býnum, har ein byrsumaður hevði skotið ítættbygdum øki*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Meðan løgreglufólk vóru úti í arbeiðsørindum aðrastaðni í Havnini, leyp ein maður vápnaður við gróti á løgreglustøðina í Havn. Hann náddi at bróta seks rútar og boyggja portrið, áðrenn hann varð handtikin**

HERVERK

*Ingi Rasmussen*

Hósnáttin var rokalig á løgreglustøðini í Havn.

Ein óður og fullur maður gjørdi bart, og kastaði steinar á rútarnar á politistøðini og kastað eitt stórt á gittarportrið, sum bognaði. Maðurin náddi at bróta seks rútar, áðrenn løgreglufólk fingu steðgað honum.

Bara ein vakthavandi var á støðini, tí øll hini vóru upptikin í álvarsligari atsókn í býnum, har ein annar maður skjeyt við skørpum, og tí var onki annað at gera, enn at tilkalla fólk, og bíða til tey komu fram.

Álopið á løgreglustøðini hendi klokkan 5.40 hósmorgunin. Ein bilur við einum kvinnuligum førara setti 44 ára gamla mannin av, sum var púrasta villur, sigur Jón Klein Olsen, støðleiðari. Hann var í øðini, hevði nærmast dilirium tremens, so hann veit neyvan, hvat hann hevur gjørt.

Maðurin var so mikið ávirkaður, at tað var púrasta ómøguligt at fáa nakað burtur úr honum, men sambært Jón Klein Olsen var tað ikki løgregluna, hann var óður við. Hann hevur áður gjørt okkurt herverk, men hóast tað hesaferð gekk út yvir sjálva politistøðina, so hendir neyvan annað, enn tað vanliga ger, tá talan er um herverk.

Hann skal rinda skaðan aftur, og tað verður tilsamans ein fitt upphædd. Annars verður ikki gjørt meira.

# Løgreglan kringsetti byrsumann

**Hósnáttina skjeyt ein ørvitisfiskur óteljandi skot millum húsini í tættbygdum øki í Vesturbýnum í Havn. Løgreglan kringsetti húsini, bíðaði til maðurin var sovnaður og breyt inn í húsini og handtók mannin eftir fimm tímum. Vápnalógin er avoldað, tá slík fólk uttan nakað kunnu keypa lívshættislig vápn, heldur Jón Klein Olsen, støðleiðari**

SKOTTILBURÐUR

*Ingi Rasmussen*

Fimm minuttir í eitt náttina til hósdagin, varð løgreglan í Havn boðsend til ein tilburð í Vesturbýnum, sum kundi endað galið, um illa vildi til.

Ein 34 ára gamal maður skeyt úr einari íbúð við einari sonevndari »pumpgun« byrsu. Nógv fólk ringdu um skotriðurnar, sum dundu millum tøttbygdu húsini, og tá løgreglan kom á staðið, helt hann fram at skjóta. Bæði upp í loft, niður í túnið og inn ímillum húsini.

Talan var um ein gamlan kenning hjá løgregluni, sum áður hevur hótt við byrsu. Hesa náttina hevði hann meira enn eina kenning.

Løgreglan mannaði seg upp, tilkallaði fleiri fólk og avráddi sínámillum, hvat frægast var at gera. Fyrst var kannað, hvør annar var í íbúðini, og tað vísti seg, at bara 27 ára gamla daman, sum eisini var ávirkað, var inni.

Løgreglan gjørdi av at bíða, til tey vóru sovnað. Klokkan 5.25 brutu politistarnir hurðina inn og tóku tey á bóli. Klokkan 6.05 vóru tey handtikin uttan stórvegis dramatikk.

Løgreglan kannar nú viðurskiftini nærri. Helst verður talan um eina bót fyri brot á politiviðtøkuna. Hóast stórur skaði kundi verið spurdur burturúr, er neyvan talan um brot á vápnalógina.

## Óðamannaverk

Spurningurin er, um tað var rætt at bíða við at avvápna mannin, tí talan er um eitt deyðiligt vápn, sum skotið var við millum hús. Tað heldur Jón Klein Olsen, støðleiðari, at tað var.

– Tað er óðamannaverk at loypa á ein mann við byrsu. Vit tryggjaðu okkum fyrst, at ikki fleiri fólk vóru inni og valdu so at bíða, til tey kølnaðu niður. Vit kundu sjálvandi vápnað okkum til tenninar og lopið á, men ein slíkur maður er óútrokniligur, og tí kunnu vápnað løgreglufólk elva til, at hann ger okkurt, sum hann annars ikki hevði gjørt. Hjá okkum ráddi tað um at stinga fingurin í jørðina, so vit ikki upptrappaðu nakað, sigur Jón Klein Olsen.

Løgreglufólkini kringsettu húsini og hildu vakt alla náttina. Tey fastfrystu støðuna, sum støðleiðarin tekur til, og ímóti morgni gjørdu tey so bart og handtóku fólkini, sum nú sita í varðhaldi á politistøðini í Havn.

## Avoldað vápnalóg

Málið reisir aftur spurningin um vápnalógina í Føroyum. Hesaferð var talan um eina kalibur 12 høglbyrsu, ein sonevnd »pumpgun«. Hon kann pumpast upp og skjýtir vanliga trý skot út í eitt. Í hesum føri var hon víðkað soleiðis, at hon kundi skjóta fimm skot eftir stuttari tíð.

– Tað er alt ov lætt at koma til skotvápn. Tað líkist púra ongum. Tú kanst fara til allar handlar, har tey selja byrsur, og ert tú yvir 18 ár, so fært tú byrsuna, tú vilt hava, uttan nakað hóvasták. Vit hava eina avoldaða vápnalóg í Føroyum. Eg haldi, at Nóa hevði hana við sær í ørkini í sínari tíð, men nógv er sum kunnugt broytt síðan tá, sigur Jón Klein Olsen.